# KUNNGERÐ NR. 53 FRÁ 17. APRÍL 2002 UM ROKNSKAPARGRUNDARLAG FYRI VIRKIR, SUM BERT ERU SKATTSKYLDUG EFTIR KOLVETNISSKATTALÓGINI

**Kunngerð nr. 53 frá 17.04.2002** '); document.writeln(''); } //-->

Nr. 53 17. apríl 2002

Við heimild í § 14, stk. 2 og § 18 í løgtingslóg nr. 16 frá 14. februar 2000 um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin) hevur landsstýrismaðurin ásett:

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri feløg og persónar, sum ikki koma undir §§ 1 og 2 í skattalógini, og sum hava inntøkur í samband við vinnuligt virksemi, ið koma undir Kolvetnisskattalógina. Inntøkur eftir kapittul 2 og 2a í Kolvetnisskattalógini verða ikki viðgjørdar eftir hesi kunngerð.

**§ 2.** Serligt roknskaparúrtak, ið Toll- og Skattstova Føroya letur gera, skal nýtast av teimum, ið eru umfatað av hesari kunngerð. Hin roknskaparskyldugi skal leggja roknskaparhald sítt til rættis soleiðis, at krøvini í roknskaparúrtakinum kunnu uppfyllast.
*Stk. 2.* Fylgjandi krøv skulu uppfyllast:

**nr. 1.** Allar skrásetingar skulu kunna fylgjast fram til roknskaparúrtakið. Tølini í roknskaparúrtakinum skulu kunnu loysast uppí tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

**nr. 2** Inntøkurnar skulu kunna sundurliðast fyri hvønn sáttmála, jbr. § 7 í Kolvetnis-skattafyrisitingarlógini. Tað skal vera møguligt at eftirkanna, at tílík inntøka er tikin við í roknskaparúrtakið.

**nr. 3.** Beinleiðis útreiðslur skulu tilskilast eftir útreiðsluslagi, jbr. roknskaparúrtakið.

**nr. 4.** Um óbeinleiðis útreiðslur verða býttar, skal í einum yvirliti verða víst, hvørjar útreiðslur eru við í býtinum, umframt hvørjir býtislyklar eru nýttir. Tølini, ið eru við í býtinum, skulu vera váttaði av einum óheftum grannskoðara, um tey ikki kunnu skjalprógvast á annan hátt, ið skattamyndugleikarnir halda vera nøktandi. Saman við yvirlitinum skal fylgja ein frágreiðing um nýttu býtislyklarnar, umframt ein lýsing av hvussu skuldskrivingar/góðskrivingar eru býttar út á einstøku felagseindirnar ella onnur feløg. Um talan er um skyld (assosiera) feløg, systurfeløg ella dótturfeløg, skal hetta upplýsast.

**nr. 5.** Støðisfæ, sum verður avskrivað sambært avskrivingarlógina, skal sundurliðast soleiðis, at avskrivingargrundarlagið kann eftiransast, jbr. roknskparúrtakið.
*Stk. 3.* Allar búskaparligar transaktiónir millum tann roknaskaparskylduga og feløg, hesin er skyldur við, skulu vísast týðuliga og soleiðis, at allar transaktiónir skulu vísast hvør sær og samlað.

**§ 3.** Ársroknskapur fyri samlaða virksemið hjá felagnum og ársfrágreiðing skal eftir umbøn latast skattavaldinum.

**§ 4.** Roknskapartilfar, sum skattavaldið heldur kann vera av týdningi fyri rættleikan av álíkningini, skal umsetast til føroyskt, um biðið verður um tað.

**§ 5.** Bóking kann fara fram í útlendskum gjaldoyra. Um tølini í roknskaparúrtakinum eru í øðrum gjaldoyra enn bókingargjaldoyranum, skal umrokningarkursurin upplýsast. Skattskylduga inntøkan skal altíð vera í krónum.

*Stk. 2.* Gjaldoyrakursur og nýtti hátturin í sambandi við umrokning í árinum frá einum gjaldoyrakursi til ein annan skal upplýsast.

**§ 6.** Reglurnar í kunngerð nr. 22 frá 27. januar 1993 um minstukrøv til bókhald og roknskap eru galdandi við teimum broytingum, ið henda kunngerð hevur við sær.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálastýrið, 17. apríl 2002

**Karsten Hansen, (sign.)**

landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge, (sign.)